# Javnaðarflokkurin bumbaður 70 ár aftur í tíðina

**Nýggj veljarakanning hjá Sosialinum vísir, at hevði løgtingsval verið nú, hevði Javnaðarflokkurin fingið sítt vánaligasta valúrslit í yvir 70 ár. Kortini hevur veljarin stórt álit á Jóannesi Eidesgaard, bæði sum løgmanni og samgonguleiðara**

VELJARAKANNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Er tað ein flokkur, sum heilt avgjørt ikki hevur áhuga í, at nýval verður útskrivað til løgtingsvalið beint nú, er tað Javnaðarflokkurin.

Ein nyggj veljarakanning, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin í hesi vikuni, vísir, at hevði løgtingsval verið í dag, hevði Javnaðarflokkurin verðið bumbaður yvir 70 ár aftur í tíðina.

Veljarakanningin vísir nevniliga, at hevði løgtingsval verið í dag, hevði Javnaðarflokkurin fingið sítt vánaligasta valúrslit síðani 1932.

Á Løgtingsvalinum tann 19. Januar í ár, fekk Javnaðarflokkurin 19,3% av atkvøðunum, men hevði val verið nú, hevði flokkurin verið fyri rættilium skrædli, tí so hevði hann ikki ikki fingið meiri enn 14,2% av atkvøðunum.

Tað er ein afturgongd upp á heili 5,1% í turrum tølum og tað hevði gjørt, at hann hevði mist ein tingmann og hevði sostatt fingið fimm løgtingslimir, afturímóti teimum seks, hann hevur nú.

## Sambandið og Fólkaflokkurin vinna

Veljararnir, sum javnaðarflokkurin missur eru sum heild farnir til Sambandsflokkin, tí samstundis sum Javnaðarflokkurin missur stórt, hevði Sambandsflokkurin havt eina framgongd upp á 3,7% og hevði verið stóri sigursharrin á valinum.

Tað hevði givið Sambandinum ein tinglim afturat teimum sjey, hann hevur nú.

Á valinum í januar fekk Sambandsflokkurin 21%, men hevði val verið nú, hevði hann fingið 24,7% og tað hevði samstundis gjørt hann til størsta flokk á tingi.

Men ein annars, sum kann kníggja sær í lógvunum, er Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins, tí eisini Fólkaflokkurin hevði staðið eftir sum tann stóri sigursharrin, hevði val verið í dag.

Á seinasta løgtingsvali fekk Fólkaflokkurin 20,1% av atkvøðunum, men var val í dag, hevði hann fingið 23,4% og tað er ein framgongd upp á 3,3%.

Tað hevði eisini givið honum ein tinglim afturat teimum sjey, hann hevur nú.

## Miðflokkurin missur

Hjá hinum flokkunum er lítil og ongin broyting. Sjálvstýrisflokkurin missur 0,1%, Tjóðveldið missur 0,2%, men Miðflokkurin stendur seg heldur ikki nakað serligt, tí hann missur 1,2% og verður stóri taparin, saman við Jóannesi Eidesgaard.

Sostatt hevði eisini Miðflokkurin mist ein av sínum trimum tingmonnum.

## Stórt álit á Jóannes Eidesgaard

Annars vísir kanningin, at veljarin hevur eitt rættiliga umstrídda áskoðan á Jóannes Eidesgaard.

Sum formaður Javnaðarfloksins, hevur hann øðrumegin tapt stórt, men hinvegin er hann samstundis tann politikarin, sum allarflestu føroyingar bæði vilja hava til løgmann og til samgonguleiðara.

Veljarakanningin vísir, at næstan fimtihvør veljari, ella góð 24%, vilja helst hava Jóannes Eidesgaard til løgmann.

Næstbest umtóktur er Høgni Hoydal, men hann vilja bara 12% av veljarunum hava til løgmann.

Her skal tó leggjast afturat, at tríði hvør veljari veit ikki, hvønn tey halda er best hóskandi at standa á odda fyri landsins stjórn.

Men kanningin vísir eisini, at heili 34% av veljarunum vilja hava Jóannes Eidesgaard at halda fram við eini millilutasamgongu saman við Sjálvstýrisflokkinum og næstan 22% vilja hava hann at skipa eina aðra samgongu.

Hinvegin vilja 17,7% hava løgmann at skriva út nýval og 20% vilja hava hann at leggja frá sær.

**Hvønn politikara høvdu tygum helst sæð sum løgmann?**

| Kategorinavn | Kode | Antall | %Alle | %Gyldige |
|---|---|---|---|---|
| Jørgin Niclassen | 1 | 43 | 4.7 | 4.8 |
| Kaj Leo Johannesen | 2 | 30 | 3.3 | 3.4 |
| Jóannes Eidesgaard | 3 | 218 | 24.0 | 24.4 |
| Kári P. Højgaard | 4 | 9 | 1.0 | 1.0 |
| Høgni Hoydal | 5 | 112 | 12.3 | 12.6 |
| Jenis av Rana | 6 | 6 | 0.7 | 0.7 |
| Annfinn Kalsberg | 7 | 75 | 8.3 | 8.4 |
| Jacob Vestergaard | 8 | 6 | 0.7 | 0.7 |
| Magni Laksáfoss | 9 | 17 | 1.9 | - |
| Helena Dam á Neystabø | 10 | 1 | 0.1 | 0.1 |
| Kári á Rógvi | 11 | 11 | 1.2 | 1.2 |
| annar | 12 | 78 | 8.6 | 8.7 |
| Veit ikki | 13 | 302 | 33.2 | 33.9 |
| ógreitt | 99 | 1 | 0.1 | 0.1 |
| Sum | | 909 | 100.0 | 100.0 |

*Inkludert 892 enheter av i alt 909*

**Hvat eigur løgmaður at gera í verandi politisku støðu?**

| Kategorinavn | Kode | Antall | %Alle | %Gyldige |
|---|---|---|---|---|
| Skriva út nýval | 1 | 161 | 17.7 | 17.7 |
| Leggja frá sær | 2 | 183 | 20.1 | 20.1 |
| Halda fram við restini av samgonguni saman v D | 3 | 309 | 34.0 | 34.0 |
| Royna at skipa aðra samgongu | 4 | 199 | 21.9 | 21.9 |
| Veit ikki / leggi ikki í at svara | 9 | 57 | 6.3 | 6.3 |
| Sum | | 909 | 100.0 | 100.0 |

*Inkludert 909 enheter av i alt 909*

*Ein meiriluti hevur álit á løgmanni og at hann hevur tamarhald á politisku støðuni*



# Fáorðaðir politikarar

**Leiðararnir á teimum báðu stóru samgonguflokkunum vístu stóran áhuga fyri veljarakanningini í Tinginum í dag, men hugurin til viðmerking var ikki eins stórur**

POLITIKKUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Millum heitar tingmenn, frustreraðar sjómenn og svang miðlafólk í Tinginum í dag hevði løgmaður, Jóannes Eidesgaard, ikki hug ella tíð at siga nógv um kanningina, sum vísir, at Javnaðarflokkurin einans hevði fingið 14,3 prosent av atkvøðunum, um val var í dag.

- Tað sær út til at vit eru tey einastu sum betala, sigur hann stutt við Sosialin.

Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi, sigur, at hann hevði roknað við, at hetta samgonguskeiðið hevði kostað Tjóðveldi meira í einari veljarakanning, og tí er hann væl nøgdur hann um úrslitið.

- Hendan samgongan hevur verið merkt av gíslatøkum, og vit eru sum flokkur ikki sloppin framat við okkara politikki. Samstundis hava vit tikið kampin um stór mál sum eitt nú fiskivinnupolitikkin.




*Talvan vísir, at hevði løgtingsval verið ídag, hevði tað elvt til stórar broytingar hjá nógvum flokkum og tveir tingmenn høvdu farið til borgarliga vongin*